# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Litføgur framsýning

Fríggjadagin 11. januar letur Petur Prent, listamaður, upp eina framsýning Smiðjuni í Lítluvík.

Petur sigur, at tey sum koma til framsýningina síggja skjótt, at hann er í ferð við at skifta stíl. Fyri at menna sín egna persónliga stíl, sá hann ongan annan hátt enn at mála út yvir 122 av málningunum, sum hann hevði málað í 2007, teir vóru ov døkkir og vóru eftir hansara meting ein plagiering hjá øðrum føroyskum listamonnum.

Hann hugsaði um at fara aftur til naturalismuna, men eftir hugsan og svøvnleysar nætur, fór hann at granska onnur listafólk sum t.d. Karel Appel (føddur í Amsterdam) (1921-2006), norðmannin Edvard Munch (1863-1944) og hálendigin Vicent Van Gogh (1853-1890).

Gult er so pent, segði Van Gogh, og tað er so satt, sum tað er sagt, men Petur Prent heldur at onkur gráur farri er eftir, av einum ávísum føroyskum listamálara, so hann væntar, at málningarnir myrkna aftur, sum tíðin líður, men vónandi í egnum stíli, hann heldur eisini, at tað er ein torfør tíð, tá ein skiftir stíl og ringt hjá áskoðaranum at gloypa.

Framsýningin er frá fríggjadegnum 11. januar til týsdagin 15. januar. Opið er allar dagar frá kl. 15-20.



*Petur Prent, listamaður, letur eina framsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík fríggjadagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Løgmaður vitjaði á Herberginum

Í nøkur ár hevur løgmaður vitjað á Herberginum hjá Felsunarherinum í Havn á jólum.

Tað er við at verða siðvenja, at løgmaður vitjar á Herberginum í sambandi við eina hugnaløtu á jólum og hevur onkra gávu við sær.



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Niels Edvard Olsen, leiðari á Herberginum*

*Mynd: Ole Valle*

**Dagurin**

**9. januar. Julianus.** Búði í Egyptalandi, og varð umleið ár 300 hálshøgdur, tá ið rómverski keisarin Diokletianus legði eftir teimum kristnu

Lesið Sosialin - so eru tit við

†

### Andlát og jarðarferðir

**John Carlsson**, fyrrverandi løgreglumaður, í Havn, ættaður av Sandi, andaðist leygardagin 67 ára gamal.

**Regin Havn Rasmussuen úr Klaksvík** andaðist sunnudagin í Odense, 75 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 11 úr Ubberud kirkju.

### Tøkk



Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið elskaða kona, mamma, omma, dóttir og systir okkara

**Margrét Halldórsdóttir**
frá Hnífsdal
búsett í Fuglafirði

doyði og varð jarðað.
Ein serstøk til Jákup Olsen fyri hjálpina í Danmark, og tit á Fiskavirking í Gøtu.
Takk fyri blómur og kransar.

*fyri tey avvarðandi*
**Poul Jacob Breiðaskarð**

### Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður mín, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Jógvan Sofus Ferjá**
Gjógv

doyði og varð jarðaður.
Vit takka Hans Jákupi Joensen, biskupi og Emil Olsen, presti fyri troystarrík og vøkur orð í kapellinum og kirkjuni.
Somuleiðis takka vit kirkjutænarum, sangarum, berarum, gravarum og tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Gjáar kirkju.
Tøkk øll tit mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Dinnafía**
**Gerda, Sjúrður, Katrin, Jónhild og Kristina**